


*Ein av ídnastu talsmonnum fyri at fáa c, q, w, x og z inn í føroyska stavraðið er Regin Eikhólm í Havn. Hann hevur fingið hesar stavirnar á nummarplátuna*

# Fólkið sigur ja til CQWX og Z

**Ein stórur meiriluti av Føroya fólki vil hava »fremmandu« stavirnar, C, Q, W, X og Z inn í føroyska stsdgasdfdafavraðið. Sambært kanning,**



Eirikur Lindenskov

Ger Løgtingið sum fólkið vil, so verða »fremmandu« stavirnir CWQZ og X við lóg partur av føroyska stavraðnum.

Lóðir hevur hevur gjørt eina kanning, har 535 fólk eru spurd, um tey taka undir við at stavir sum c. w, x, z verða tiknir við í føroyska stavraðið?

Svarið í kanningini er ógvuliga sannførandi ja, tí 64 prosent av teimum spurdu siga ja, meðan 26 prosent siga nei. 10 prosent siga seg ikki vita.

Løgtingið hevur fyrr givið til kennar, at tingfólk vilja hava hesar stavir, ið summi kalla »fremmandar« starvir, við í føroyska stavraðið. Men hóast tað, so vildi løgtingið ikki gera tað við lóg, men lat uppgávuna upp í hendi hjá Málráðnum. Tá Málráðið fór til verka, gjørdu tað av, at hesir stavir skulu ikki við í føroyska góðkenda stavraðið.

Men tann støðan sampakkar so ikki við tað, sum føroyingar halda, sambært hesi veljarakanning.

## Fleiri menn eru ímóti

Kanningin vísir eisini, at tað í størri mun eru menn, sum vilja hava hesar stavirnar upp í stavraðið. Tí 70 prosent av monnunum hava svarað ja, meðan 59 prosent av kvinnunum hava svarað ja.

Av teimum, sum eru ímóti, eru 24 prosent av monnunum og 27 prosent av kvinnunum. 7 prosent av monnunum vita ikki, meðan tann parturin av kvinnunum er tvífalt so stórur, 14 prosent.

## Fleiri eldri enn ung eru ímóti

Hyggja vit eftir aldursbýtinum, so síggja vit, at jú eldri fólk eru, fleiri eru tey, sum vilja hava hesar umstríddu stavirnar upp í stavraðið.

Av teimum, sum eru millum 60 og 75 ár eru tað 74 prosent, sum halda, at stavirnir skulu upp í stavraðið, meðan 20 prosent eru ímóti.

Av teimum millum 45 og 59 ár eru tað 69 prosent, sum eru fyri, meðan 24 prosent eru ímóti.

Hjá teimum millum 30 og 44 ár eru 67 prosent fyri og 25 prosent ímóti.

Hjá teimum ungu, millum 15 og 29 ár er støðan eitt sindur øðrvísi, umenn meirilutin er sannførandi, so eru »bert« 47 prosent fyri og 33 ímóti.

Meira um málið á síðu 8

*Løgtingið skal í hesi vikuni taka støðu til, um »fremmandu« stavirnir við lóg skulu setast inn í føroyska stavraðiði*




